# Tógverksskeið

**v/ Ole Magnus**

*Vit leggja snøri við hond á gamla máta*
*– úr tjøraðum hampi, børki og hestafaksi*
*– nýta nýggj og gomul snørisgøgn*
*– tógverk til teinæringin*

**á Skeiðsdeplinum á Langasandi mikudagin 31. mai til sunnudagin 4. juni**

Fyri allar 5 dagarnar við gisting og fullum kosti: …… **1.200 kr.**
fyri 5 dagar uttan gisting men við fullum kosti: ……… **1.000 kr.**
luttøka ein dag:…...….…..... **200 kr.**
og fyri kvøldið: ……............... **100 kr.**

Tekning sum skjótast á Skeiðsdeplinum tlf. 422073, ella hjá nevndini í »Teinæringinum«: Óla Mikkelsen, tlf. 314080, Janus Petersen, tlf. 424456 ella Regin Debess, tlf. 448587.

# Svimjivenjari søkist

Fuglafjarðar Svimjifelag søkir eftir venjara til svimjiárið 2000-2001.

**Vit kundu hugsa okkum:**
- at tú hevur verið á venjaraskeið ella
- hevur royndir innan svimjing.

**Um hetta hevur tín áhuga:**
Fæst meir at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 444187.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **15. juni 2000.**

**Fuglafjarðar Svimjifelag**
Norðuri í Bø 3
530 Fuglafjørður

**Útvega tær amboð til at broyta lív títt**
**á einum háskúla, ið undirvísir í háttum at handfara lívið og finna gleði, kærleika og sjálvsvirði. Skúlin er fyri øll, ið hava brúk fyri at menna seg!**
Vit bjóða skeið, ið eru 16 & 20 vikur til longdar. Harumframt er skeið, ið varir 2 vikur og kann setast saman til eitt uppihald, sum hóskar inn í tína tíðarætlan. Vit hava næmingar í øllum aldri - frá 18 árum upp í 80 ár, og miðalaldurin er umleið 42 ár.
Prísur (long skeið): 650,- kr./viku
Prísur (stutt skeið): 760,- kr./viku
Íroknað í prísin eru undirvísing, kostur, uppihald og tilfar. Til ber at søkja studing frá Stuðulsstovninum.
Les meir um skúlan á www.vhd.dk
Kærar heilsanir
**VÆKSTHØJSKOLEN DJURSLAND**
Sunddalvej 1 - Ginnerup - 8500 Grenå - Danmark
Telefon: 0045 86339188 - Fax: 0045 86339167

# Kinesolog Oda Fuglø

**er at hitta á tel. 456532 frá 17/5 til 26/5**

- Psykisk, fysisk og kemisk viðgerð
- Innlæringstrupulleikar
- Hormonbalansuviðgerð v.m.


# Undirvísingar- og mentamálastýrið

# Lærugreinaráðgevi í føroyskum

## fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum lærugreinaráðgevi í føroyskum fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar leyst at søkja til setanar 1. august 2000.

Høvuðsuppgávurnar hjá lærugreinaráðgevanum verða m.a., at:
- Menna innihald og góðsku í lærugreinini føroyskt
- Hava námsfrøðiligt eftirlit við undirvísingini í føroyskum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan fakøkið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Stíla fyri eftirútbúgving av lærarum
- Luttaka í verkætlanum serliga á tí námsfrøðiliga økinum og innan KT-økið
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugafelagsskapir

Lærugreinaráðgevin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

Viðkomandi má umfram omanfyri nevndu uppgávur vera til reiðar at átaka sær aðrar almennar uppgávur í fyrisitingini.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarnir hava
- Kandidatprógv frá universiteti við prógvi í føroyskum, sum í minsta lagi skal vera á exam.art-stigi
- Verkliga og ástøðiliga námsfrøðiliga útbúgving
- Undirvísingarroyndir á miðnámsstigi ella hægri stigi
- Áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- Góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- Førleika at menna samstarvið við einstøku stovnarnar, lærararnar og áhugafelagsskapir
- Áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Lærugreinaráðgevin verður settur í fyrstu atløgu í 3 ár. Síðani kann setanartíðin eftir umsókn verða longd tvær ferðir við tveimum árum hvørja ferð. Um serstøk viðurskifti gera seg galdandi, kann setanarskeiðið verða longt meira enn 7 ár.

Arbeiðstíðin í ráðgevarastarvinum er 2/3 av fullari arbeiðstíð. Eftir nærri avtalu millum Undirvísingar- og Mentamálastýrið og viðkomandi útbúgvingarstovn skal tann, ið settur verður sum ráðgevi, harumframt undirvísa í mesta lagi 1/3 starv í einum vinnu- ella miðnámsskúla ella hægri útbúgvingarstovni.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrið og deildir og stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. mai 2000.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Rúnu Hilduberg, deildarstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, á tlf. 355050

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini** eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlarnir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og lærlingaútbúgvingar.
Málsøki hjá Mentamáladeildini eru m.o. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli, Sjúkrasystraskúli Føroya, Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya, siðsøguligu søvnini, bókasavnsverkið, gransking, ítrótt, kirkjumál, ungdómsmál og mentanarligt virksemi sum t.d. bókmentir, myndlist,tónlist og leiklist.


**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

**FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen**
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16







# Evnisskeið

**Leiðsla í nýggju øldini**

**Í okkara øld er tann rætti leiðsluhátturin avgerandi fyri, um ein fyritøka fer at hava eydnuna við sær ella ikki.**

Kendi fyrilestrahaldarin og professorur við Handilsháskúlan í Århus, **Steen Hildebrandt**, kemur til Føroyar at hava evnisskeið við hesum evni. Steen Hildebrandt tekur tráðin upp, har Lars Kolind slepti.

**Orsakað teim stóru broytingunum í samfelag okkara verða krøvini á arbeiðsmarknaðinum tilsvarandi stór, eins og leiðsluhættirnir verða tað.**

**Hugtøk sum "Den lærende organisation", "Forandringsledelse", "Værdibaseret ledelse", "Knowledge Manegement" eru hugtøk, sum nýggju, alheims leiðsluástøði hava lagt dent á, og sum Steen Hildebrandt fer at viðgera á hesum evnisskeiði.**

**Læruprocessir og vitan hava alstóran týdning fyri, um fyritøkur skulu hava framburð og vera kappingarførar á altjóða støði. Júst hesi viðurskifti eru neyðug, um fyritøkurnar skulu vinna kappingina við teim smáu marginalunum.**

**Steen Hildebrandt fer at greiða frá, hvussu leiðsluhættirnir verða, hvørjar avbjóðingar og forðingar verða, og hvørjar fyritreytir skulu verða til staðar fyri, at man sum leiðari á fyritøkuni fær eydnu við sínum leiðslustarvi.**

| | |
|---|---|
| Dagur: | Mikudagur 31. mei 2000, kl. 14.00 - 20.00 |
| Stað: | Hotel Føroyar<br>Kaffi við heimabakaðum køkum<br>Døgurði við tveimum rættum og onkrum leskandi afturvið<br>Kaffi við smákøkum |
| Tilmelding: | **Føroya Handilsskúli**, Marknagilsvegur 177, Fo-100 Tórshavn<br>tel 31 71 77<br>Kontaktpersónur: Katrin Gudmundsdóttir Isfeld,<br>T-postur:kgi@hsh.fo |
| Freist: | 24. mei 2000 |
| Kostnaður: | kr. 1550.- |
| Málbólkur: | Topleiðsla, millumleiðsla, komandi leiðarar og annars øll, sum hava áhuga í nútímans leiðslu. |

**LEIÐSLUMENNINGARBÓLKURIN**
FØROYA HANDILSSKÚLI


**P/F ALMA** *Maskinverkstaður & Smiðja*

## Servicefólk / mekanikarar

**Søkt ver›ur eftir fólki til verksta›in at byrja beinanvegin.**

**Vit hava brúk fyri fólki at umvæla og servisera bæ›i maskinur og motorar.**

**Arbei›ir tú sjálvstø›ugt og hevur hug til eitt fjølbroytt starv, so ring til:**

**Snorri Johansen**
**á telefon 315 890 ella 222 003**

**P/F ALMA**
**á Hjalla 15**
**P.O. Box 1338**
**FO-110 Tórshavn**
**Tel. 315 890**
**Fax 313 500**
**E-mail: alma@alma.fo**
**www.alma.fo**

CAT MaK G cranes GROVE worldwide Atlas Copco Munters epoke BUCHER SCHÖRLING


*KPMG*

# Roknskaparleiðari

Fyri P/F Svend Krosstein søkja vit eftir einum roknskaparleiðara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Roknskaparleiðarin, sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran, hevur ábyrgdina av teimum roknskaparligu viðurskiftunum hjá felagnum so sum
- at leiða og skipa dagliga arbeiðið í bókhaldi felagsins og tryggja, at bókhaldið støðugt er dagført
- debitorrøkt
- gjalding av ognarum
- mvg-uppgerðum felagsins
- ársroknskapi felagsins

Harumframt skal roknskaparleiðarin verða við til at viðlíkahalda og dagføra dagligu mannagongdir felagsins.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt spennandi og avbjóðandi framtíðarstarv.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin
- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til bókhald og roknskap
- er vanur at arbeiða við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til
KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 22. mai 2000.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

***P/F Svend Krosstein rekur heilsølu við VHS-vørum v.m. umframt at felagið eisini hevur smásølu í handlinum uppi á Hálsi í Tórhavn. Harumframt eigur felagið fleiri bygningar, sum verða leigaðir út.***

***Hjá felagnum starvast í løtuni 17 fólk. Av hesum starvast 2 í bókhaldinum umframt roknskaparleiðaran.***

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34,
Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team 85 • 31 65 11


# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*